Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Hanna Jensen, løgtingskvinna

Svarari: Jóhan Christiansen, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Gongubreytir og kantsteinar við Gøtugjógv

Spurningar:

1. Hvussu gongur at fyrireika arbeiðið at bøta gongubreytir og kantsteinar við Gøtugjógv?
2. Nær verður arbeiðið at bøta gongubreytir og kantsteinar við Gøtugjógv framt, og hvat ella hvørji øki fevnir arbeiðið um?
3. Hvørjar aðrar ætlanir hevur landsstýrismaðurin, tá um samferðslumynstrið við Gøtugjógv ræður, og ætlar hann at fáa játtan til vegar til fleiri átøk til batar fyri ábæru ferðsluna í økinum á fíggjarlógini fyri 2026?

Viðmerkingar:
Ein verkætlan, sum hevur havt játtan á fíggjarlógini bæði í 2024 og í 2025, er enn ikki framd, og tað er ein, sum á fíggjarlógini er at finna á løgujáttanini á konto 05.38.1.07 Nýggir landsvegir.Teksturin fyri tær játtaðu 2 mió kr. í fíggjarlógini fyri 2024 var: "Asfaltering: Játtaðar verða 2 mió. kr. til at gera gongubreytir, kantsteinar og ferðslutálmandi átøk við Gøtugjógv".
Á fíggjarlógini fyri 2025 var játtanarteksturin til somu konto: "Játtaðar verða 500 tús kr. til at fremja útbodnu verkætlanina gongubreytir og kantsteinar við Gøtugjógv." Hetta er tingsins vilji, og í fjør varð verkætlan bjóðað út, men tó ikki framd. Aftur í ár hevur okkurt útbjóðingarvirksemi verið, men sum skilst hevur eingin maskina enn verið at sæð í økinum, og nú er heystið aftur her.

Fyri vanlig fólk er tað ikki so lætt at skilja, at arbeiðið enn ikki er gjørt. Tørvurin á ábótum er sera eyðsýndur fyri øll, sum ferðast ígjøgnum økið til gongu, á súkklu, við vogni og í akfari. Hetta er ein farleið, har meira enn 6000 bilar koyra dagliga, og ávirkar hetta tí ábæru ferðsluna nógv.

Nógv meira átti at verið játtað, so at fleiri av teimum góðu hugskotunum fyri ferðsluna í økinum kunnu verða framd í verki. Eisini fleiri beinleiðis ferðslutálmandi átøk. Men hesar 2,5 mió til at bøta gongubreytirnar og kantsteinarnar eru so til eitt minstamark av viðlíkahaldi, sum undirritaða heldur eigur at vera gjørt alt fyri eitt, sum liður í at skipa økið, meðan arbeitt vónandi verður víðari við samferðsluni í økinum.

Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 10. september 2025

Hanna Jensen